## UTTAN ÚR HEIMI

## Lækni fór illa við børnum

Myndugleikarnir í Kili hava tikið týska læknan Gisele Seewald, eftir at hon hevur viðgingið, at hon fór illa við fleiri børnum í sjeytiárunum.

Tann 75 ára gamla Gisele Seewald var stjóri á einum sjúkrahúsi í sjeytiárunum, og hon hevur greitt løgregluni frá, at hon gav starvsfólkinum boð um at viðgera óskikkilig børn við elektriskum stoyti og doyvandi evnum. Hon hevur eisini viðgingið, at ungar gentur, sum ikki vildi hava kynsliga samveru við ein tilkomnan mann, fingu somu viðgerð.

Sjúkrahúsið, sum Gisele Seewald var stjóri á, er í økinum Colonia Dignidad í Kili, har nógv týsk niðursetufólk búgva, og fyrr í ár tók kilska løgreglan oddamannin hjá niðursetufólkunum og skuldsetti hann fyri hava gjørt seg inn á børn og fyri at hava samstarvað við einaræðisstýrið hjá Augusto Pinochet, generali.

Fólk, sum einaræðisstýrið fongslaði, hava greitt frá, at tey vórðu flutt til Colonia Dignidad, og at tey vórðui illa viðfarin, meðan fangavørðarnir spældu tónleik hjá Wagnher og Mozart.

## Postboð á hundaskeiði

Vanliga hoyra vit, at postboð kvíða seg fyri at fara við posti, har hundar ganga leysir, men í Týsklandi hevur npostverkið tikið stig til at gera arbeiðið hjá postboðunum tryggari.

Tiltakið byrjaði fyri fýra árum síðani, eftir at mong postboð høvdu kært seg um, at tey ræddust summar hundar. Postverkið gjørdi tí av at skipa fyri einum skeiði, har serkøn greiddu postboðunum frá, hvussu ein hundur hugsar, hví hann kann finna uppá at bíta, og nær hann gevur tekin um, at hann ætlar sær at leypa á. Sylvia Blesing, sum er talskvinna hjá Deutsche Post, sigur, at hesi árini hava 80.000 postboð verið á skeiði, og at úrslitið hevur verið sera gott, soleiðis at nú eru tað munandi færri postboð, sum siga seg hava trupulleikar av hundum.

Týska hundafelagið heldur, at hundaeigararnir eiga at gera sítt til, at postboðini fáa frið til at røkja sítt arbeiði. Felagið sigur, at postboðini í Týsklandi koma altíð til ásetta tíð, og tí eigur tað ikki at vera nakar trupulleiki hjá fólki at hava hundin inni, tá postboðið kemur við postinum.



*Í Týsklandi hava postboðini lært, hvussu ein hundur hugsar, og nær hann vísir tekin til at leypa á*

## Fáa ikki døgurðalúr longur

Tjóðartingið í Spania hevur samtykt eina lóg, sum bannar almennum starvsfólkum at halda tann gamla siðin at fáa sær ein lúr aftan á døgurða ella „siesta“, sum spaniumenn rópa hetta fyribrigdið.

Jordi Sevilla, ráðharri í trivnaðarmálum, sigur við Reuter, at lógin skal gera tað lættari hjá fólki at sameina arbeiði og familjulív, og hann man vita, hvat hann tosar um, tí sjálvur eigur hann trý børn. Harafturat hevur broytingin stóran samfelagsligan týdning, tí sambært einari kanning brúka spaniumenn bara 60 prosent av tí vanliga arbeiðsdegnum til sjálvt arbeiðið.

Eftir nýggju lógini skulu tey almennu starvsfólkini í Spania hava døgurðatíma frá klokkan 12 til 13 eins og aðrir evropearar og ikki frá klokkan 14 til 16 sum higartil. Jordi Sevilla, ráðharri, sigur, at við broytingini kunnu fólk fara til hús klokkan 18 og ikki sum nú klokkan 20.

Stjórnin sigur seg vóna, at tey privatu arbeiðsplássini fara at gera tað sama sum tey almennu, men nógvir spaniumenn eru ímóti broytingini, tí teir vilja fegnir varðveita døgurðalúrin heldur enn at koma tveir tímar fyrr til hús um kvøldið.



# Máttu drekka landið

**Í ellivu samdøgur róku Steven Freeman og Mark Smith á havinum, eftir at bátur teirra sakk.**

Í HAVSNEYÐ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Teir vóru illa á holdum komnir, tá eitt bjargingarskip kom fram á teir og flutti teir á eitt sjúkrahús á einari oyggj úti fyri vietnamesisku strondini. Tá var tann 49 ára gamli avstraliumaðurin Mark Smith lætnaður tólv kilo, síðani hann var farin úr Hongkong hálva aðru viku frammanundan saman við 30 ára gamla vinmanni sínum, nýsælendinginum Steven Freeman.

Teir báðir skuldu sigla tann 65 føtur stóra seglbátin úr Hongkong til Avstralia, men teir høvdu bara siglt eitt lítið samdøgur, tá báturin fór at leka og sakk, skrivar AP. Hetta hendi so skjótt, at teir báðir menninir fingu ikki stundir at taka nakað við sær í bjargingarbátin.

Í samfull ellivu samdøgur róku teir á havinum, og tostin noyddi teir at drekka sítt egna land. Bjargingarbáturin vísti seg at vera sera rankur, so hann holvdist fleiri ferðir. Hvørja ferð endaðu teir í sjónum, men tað eydnaðist teimum at sleppa aftur í bátin hvørja ferð.

Eftir at hava verið á sjúkrahúsinum í Vietnam í fimm samdøgur, sluppu Steven Freeman og Mark Smith hað-ani, og tað er einki at siga til, at teir fóru beina leið til hús.

# Har kalda kríggið var kaldast

**Undir kalda krígnum gjørdu russar loyniligar rannsóknir á Norðpólinum. Granskararnir høvdu fingið boð um at beina fyri sær sjálvum og útgerðini, komu amerikanararnir fram á teir**

KALDA KRÍGGIÐ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Meðan kalda kríggið var upp á tað harðasta, róku nakrir av heimsins fremstu vísindamonnum á einum ísflaka við Norðpólin. Hetta vóru sovjetskir vísindamenn, men ikki fyrr enn nú fáa vit at vita, hvat teir tókust við.

Í einari nýggjari bók kemur fram, at vísindamenninir høvdu fingið til uppgávu at kanna havbotnin kring pólin, og at teir eisini skuldu kanna, hvussu saltur sjógvurin har var. Ein annar partur av uppgávuni var at útvega meiri vitan um ta magnetisku ávirkanina norðuri við pólin. Hesar upplýsingar vóru neyðugar fyri teir sovjetsku kavbátarnar, sum sigldu undir ísinum, og kanningarnar vóru so loyniligar, at vísindamenninir høvdu fingið boð um at taka lívið av sær og at beina fyri útgerðini, komu amerikanararnir fram á teir.

Bókin um tær sovjetsku kanningarnar hevur vakt ans í Noregi, tí helst er tað so, at russar hava sera holla vitan um havbotnin í pólhavinum, og helst vita teir eisini, hvat fjalir seg undir botninum. Tað kann fáa alstóran týdning, tá russar um ikki so langa tíð ætlandi fara at leita eftir olju og gassi har norðuri.

-Tað vísindaliga tilfarið er ógvuliga rúgvusmikið. Sumt hava russar almannakunngjørt, men ein part vilja teir hava fyri seg sjálvar, sigur stjórin í fyritøkuni Akvaplan-niva, Salve Dahle, við Aftenposten. Hann sigur, at í veruleikanum er tað rættiliga pínligt fyri Vesturheimin, at hann ikki veit nakað um tær umfatandi kanningarnar hjá sovjetsku vísindamonnunum.

Kanska er tað hendan holla vitanin, sum ger, at russisk vísindafólk eru ósamd við tey, sum siga, at ísurin í pólhavinum fer at minka burtur í einki. Russisku vísindafólkini vísa á, at tá ísurin bráðnar, kemur meiri feskvatn í sjógvin, og tað fer at hava við sær, at vit fáa meiri ís.

Russisk vísindafólk haloda framvegis til á ísinum við Norðpólin, men nú eru kanningarnar ikki loyniligar longur.